Toll- og Skattstova Føroya, Vága Øki

## Avloysarastarv

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Vága øki, er avloysarastarv svarandi til fulla starvstíð leyst at søkja fyri starvsfólk, sum burturav er sett til aðrar upgávur í **1 ár,** frá 21/8-2000.

**Arbeiðsuppgávur:**
Talan er um fjølbroytt arbeiði, ið umfatar bæði eftirlitsarbeiði og avgreiðslu og eru uppgávurnar m.a. hesar:

– persónlíkning, fyribilslíkning, stuðulsskipanirnar, journal, dupultskattamál, eftirlønir/rentutrygging.

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving e.l., vera arbeiðssamur, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiði til rættis. Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við telduarbeiði – kunnleika til EDV er ein treyt – og skal vera førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðnum. Tað er ein fyrimunur við arbeiðsroyndum innan skattalóggávuna.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 15. lønarflokki. Løn og setunarviðurskifti verða ásett eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og møgulig viðmæli skulu sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Vága øki, **innan 4. august 2000.**

**Toll- og Skattstovu Føroya
Vága Øki
380 Sørvágur**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalógávuna og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 145 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum, ið heldur til á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, sum eru í Klaksvík, Saltangará, Sørvági, Skopun, á Tvøroyri og í Tórshavn, røkja raksturin. Á Vága øki, har viðkomandi skal starvast, starvast 9 fólk.

## Skrivari

Søkt verður eftir bygdaráðsskrivara til Skála Kommunu, at byrja 15. sept. 2000.

Høvuðsuppgávur:
Bygdaráðsskrivarin er næsti maður bygdaráðsformansins og er dagligur leiðari av umsiting bygdaráðsins og kommunalu starvsfólkum tess. Eisini er bygdaráðsskrivarin skrivari hjá bygdaráðnum og nevndum tess.

Førleikar:
Vit vænta at tygum:
- hava góð samstarvsevnir.
- duga at samskifta við borgaran og stovnar.
- hava áhuga í samfelagsviðurskiftum.
- hava hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir.

Starvið verður sett eftir reglunum í tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknirnar skulu vera Kommunuskrivstovuni í hendi innan *leygardagin 5. august 2000.*

Um hetta hevur tygara áhuga, ella tygum hava spurningar, eru tygum vælkomin at ringja til: Kommunuskrivstovuna, tlf. 441179, Símun Paula Berg, bygdaráðsform., tlf. 441209 ella Johannu Olafsdóttir, skr., tlf. 441250.

SKÁLA KOMMUNA



Sosialurin - 311820

Stóra bringu
-ella lítla?

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd.
Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri
lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

· Atlas Copco borivognar
· Alt innan boring & boriútgerð
· Atlas Copco luft-kompressarar, størri & smærri -til allar uppgávur!
· Eykalutir til flest allar entreprenørmaskinur
· Vit útvega allar entreprenørmaskinur!
Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár... Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

## Summarfrí

Vegna summarfrí verður Kommunuskrivstovan stongd í tíðini frá mánadegnum 17. juli til mikudagin 9. august 2000

Skála Kommuna

Original
bosal
Útstoyt

p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629

Sosialurin - 311820

Gravsteinar og kantsteinar.
Nú eisini úr føroyskum grót!

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

fk

Lesið sosialin



# Kendur bretskur blaðmaður endaði í geglinum í Havn




*John Vidal frá bretska blaðnum, The Guardian, varð handtikin stutt eftir at hann kom í land í Vestmanna mánakvøldið*
*Mynd: Jens K. Vang*

Jan Müller

Hann hevur ferðast kring allan heimin sum blaðmaður og hevur vitjað ikki færri enn 80 lond - serstakliga fyri at skriva um umhvørvismál. Hann eitur John Vidal og er 50 ára gamal, so royndirnar á blaðmannaøkinum eru drúgvar. Og hann er heldur ikki hvør sum helst. Hann er umhvørvisblaðstjóri á seriøsa og vælumtókta bretska blaðnum The Guardian.

John Vidal, sum fyrr hevur skrivað um hvalaspurningin og eitt nú hevur roynt at lýsa norsku sjónarmiðini í hvalamálinum setti sær herfyri fyri at greiða lesarum sínum frá grindamálinum.

-Tað hevur alla tíðina verið ætlan mín at dekka málið frá báðum síðum, sum jú eisini er uppgávan hjá okkum journalistum sigur ein fryntligur og vinsælur John Vidal í samrøðu við Sosialin.

-Eg fari at heita á tykkum sum blað um at hjálpa mær í land vóru orð hansara, tá blaðið tosaði við hann leygardagin.

John Vidal fór umborð á Ocean Warrior í Lervick. Ætlanin var so at viðgera sjónarmiðini hjá teimum umborð fyri síðani at fara í land í Føroyum fyri at fáa føroysku sjónarmiðini. Men tað vildi so illa til, at løgreglan í Føroyum vildi bert loyva journalistum við altjóða pressukorti í land. John hevði einki slíkt. -Eg havi ferðast í so mongum londum, og ongastaðni havi eg havt trupulleikar av hesum slag sigur hann. Ongastaðni hevur slíkt pressukort verið nakað krav fyri at koma inn í landið, tí ørkymlar tað hann, at tað nettupp í Føroyum skal liggja slíkt órímuligt krav.

-Eg havi mítt bretska pressukort og eg havi pappír , sum prógva, at eg arbeiði hjá The Guardian.

Mánakvøldið hendi so tað, at fleiri av journalistunum frá Watson-skipinum komu í land í Havn og í Vestmanna. John Vidal vildi ikki vera „gísli“ umborð longur og tók „tjansin“ at fara í land við gummibáti. Men løgreglan var fyri honum í Vestmanna og hann var tikin á støðina.

Áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár hevði Sosialurin samband við bretska blaðmannin. John Vidal var í góðum hýri og bíðaði eftir, at løgreglan ella rættur skuldi fáa borið so í bandi, at hann kundi gera sítt journalistiska arbeiðið liðugt.

-Eg vil fegin sleppa at tosa við føroyingar og greiða frá teirra sjónarmiðum um hetta málið, soleiðis at lesarar okkara fáa søguna frá báðum síðum sigur hann við Sosialin.

John Vidal sigur annars, at hann er rættiliga skelkaður av at kenna seg skýrdan sum terrorist, nú hann ikki kundi fáa loyvi at koma í land av skipinum.

-Er hetta tað føroyingar vilja hava meg at skriva? Eg vil sleppa at siga tykkara søgu, og tað er m.a. tí eg eri komin higar. Eg havi bílagt mær ferðaseðil við flogfarinum, so tað hevur ongantíð verið meiningin at vera við skipi Watson alla tíðina. Ætlan mín var at vera tveir dagar umborð og tveir dagar í landi.

John Vidal er høgt virdur journalistur í Bretlandi. Hann hevur fleiri ferðir fingið virðirslønir fyri síni journalistisku avrik.

# Vil hava stuðul frá føroyingum

*Hálendski tíðindamaðurin, sum mánadagin varð handtikin, tá hann kom í land í Havn, vil hava føroysk tíðindafólk at stuðla tíðindafólkunum, ið ikki sleppa av Ocean Warrior*



*Eric Mooe, tíðindamaður úr Hollandi, var ein teirra, ið hevði innfaraloyvi. Men hann varð kortini handtikin*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

John Johannessen

– Tað er ein vanæran, at løgreglan sýtir objektivum tíðindafólkum at koma í land frá Ocean Warrior fyri at bera tykkara síðu av søguni um grindadráp. Hetta eiga føroysk tíðindafólk at leggja sær í geyma, segði hálendski tíðindamaðurin, Eric Mooen, tá hann kom í land í Havn mánakvøldið.

Eric Moen sigur, at orsøkin til, at hann saman við øðrum fjølmiðlafólkum er komin við Ocean Wartrior til Føroya er, at hann vil skriva objektivt um herferðina hjá Watson.

– Eg eri við í bátinum fyri at tryggja, at mannigin verður viðfarin rætt av føroysku myndugleikunum, sigur hann.

Hálendski tíðindamaðurin sigur seg einki hava ímóti føroysku tíðindafólkunum. Hann sigur seg vera vísan í, at tey eru eins dugnalig, sum tey umborð á Ocean Warrior. Men kortini leggur hann dent á, at rætti mátin at bera tíðindi um herferðina, er at hava tíðindi frá báðum síðum, og ikki bert frá føroysku síðuni.

– Tit kunnu sammeta okkum tíðindafólk, sum ST eygleiðarar, ið skulu halda eyga við, um alt fer rætt fram. Tað sama eiga tit at gera, vísir Eric Mooen á.

Tá Sosialurin beint eftir døgurða í gjár hevði samband við løgregluna, vildi hon ikki siga, um Eric Mooe var latin leysur ella hann framvegis sat í varðhaldinum.

∆